Landsbanki Føroya
FAROE ISLANDS GOVERNMENTAL BANK

Argir 14. november 2025

Hoyringsvar um uppskot til Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum

Landsbankin metir tað framvegis ikki vera ráðiligt at bora ein tunnil til Suðuroyar, sum fíggjarligu útlitini eru í løtuni. Tað fer at seta vælferðina í vanda, tí almenni búskapurin er ikki haldførur. Tað er hall á fíggjarlógini, bæði hjá land og kommunum, hóast bestu búskaparligu tíðir. Og orsakað av demografisku gongdini, tað vil siga at vit vera so nógv fleiri eldri fyri hvønn skattgjaldara, so fer hallið komandi nógvu árini at veksa nógv.

Framrokningar av inntøkunum og útreiðslunum hjá landi og kommunum vísa, at árliga hallið veksur so skjótt, at tað verður út við eina milliard um 10 ár. Eitt nú útreiðslurnar til pensjón, sjúkrarøkt og eldrarøkt fara at veksa munandi. Tað verður tí neyðugt at gera inntøkuhækkingar og útreiðsluskerjingar fyri út við eina milliard krónur í árligu fíggjarætlanunum næstu 10 árini.

Neyðugt er tí fyrst at gera eina ætlan fyri, hvussu fíggjarpolitikkurin skal fáast aftur á beint, soleiðis at tað almenna fær ein haldføran búskap. Landsbankin hevur trupult við at síggja, at politikkarar taka hesa risa avbjóðing í álvara. Tí hóast tað hevur verið gjørt vart við hesa avbjóðing í fleiri ár, so er enn eingin ítøkilig ætlan við nýskipanum og sparingum gjørd, sum ger, at Føroyar fáa ein fíggjarpolitiskan haldføran búskap.

Verður henda risa avbjóðing við haldførinum ikki tikin í álvara, so fer tað at ganga út yvir vælferðina. Størsti parturin av skattapengunum, sum borgarin og vinnan rindar, verða brúktar til vælferðartænasturnar pensjónir, eldrarøkt og almannaveitingar annars, til heilsuøkið, harundir sjúkrahúsini og til skúlar. Neyðugu sparingar fara tí at raka hesi vælferðarøkini og stórur vandi er fyri, at vælferðin minkar. Alternativt ber eisini til at seta skattin upp, tó uttan at einstaki borgarin fær betri tænastu fyri skattahækkingina.

Tí staðfestir Landsbankin enn einaferð, at neyðugt er fyrst og fremst at gera eina ítøkiliga ætlan fyri at fáa haldførið í almenna roknskapin. Átøk, íløgur og tiltøk, sum bøta um haldførið eiga at hava hægstu raðfesting. Ikki fyrr enn henda ætlan fyriliggur og er sett í verk, eigur at verða hugt at einum møguligum tunli til Suðuroyar.

Byggiváðin
Landsbankin skal gera vart við, at størsti váðin í ein verkætlan sum hesi, er byggiváðin. Er gjørt klárt í verkætlanini, hvør stendur við ábyrgdini og harvið kostnaðinum, um óvæntaði jarðfrøðiligi viðurskifti stinga seg upp. Meirkostnaðurin av tílíkum kann verða risa stórur. Feskasta dømi er tunnilin til Fámjin.

Neyðugt er at politisku myndugleikarnir eru greiðir yvir, hvør ber kostnaðin av byggiváðanum.

Landsbanki Føroya · Kvíggjartún 1 · Box 229 · FO-165 Argir

Frágreiðingin um fíggingarleist og nú ískoyti til fíggingarleist
Í hoyringsvarinum til fyrra løgtingsuppskotið um Suðuroyartunnilin var metti kostnaðurin (uttan byggirentur) mettur at vera 4 mia. Nú er metti kostnaðurin 4,9 mia. kr. uttan byggirentur. Tað ger bara støðuna uppaftur verri. Harafturat ynskir Landsbankin at vísa á, at óhefti ráðgevin Kasper Nordmelan, sum vegna landsstýrið hevur hugt at verkætlanini, vísir á, at kostnaðarmetingin er bjartskygd. Sannlíkt er tí, at hann kemur at kosta meira enn 4,9 mia. kr.

Harafturat vil Landsbankin vísa á fyrivarni, sum Landsbankin hevði til "Fíggingarleistur Løgmansskrivstovan, oktober 2024". Niðurstøðurnar eru enn galdandi. Millum annað verður víst á at:

- Fíggingarleisturin, mentur í einum rokniarki, kann bert brúkast til at fáa vitan um, hvussu nógv av tunnilskostnaðinum verður rindaður av ferðsluni og hvussu nógv skal rindast av landskassanum
- Hann kann als ikki nýtast til at taka avgerð, um íløgan skal gerast ella ikki
- Hesin fíggingarleistur tekur bert atlit til kostnað og ikki atlit at, at ávísar íløgur hava ymsa samfelagnyttu.
- Ei heldur verður tikið atlit at, at landskassans skuld veksur við upp til 6 mia. kr. (Núverandi metti kostnaðurin íroknað byggirentur)
- Harafturat verður als ikki fyrihildið seg til, hvussu íløgan og lántøkan fara at ávirka haldførið og rásarúmið hjá landskassanum komandi árini.

Óansæð, so hevur Løgmannskrivstovan dagført fíggingarleistin við teimum nýggju upplýsingunum, sum nú eru tøkar við skjalinum "Ískoyti til fíggingarleist frá oktober 2024".

Landsbankin hevur fingið rokniarkið sendandi frá Løgmannskrivstovuni. Rokniarkið vísir við fylgjandi broytingum í fortreytum:

- Kostnaðurin er nú 4,8 mia (broytt frá 4 mia)
- Rentan er nú 4%, sum er meting frá september 2025 (broytt frá 3,5%)
- Sparingin av Sildberanum er nú tikin við, tað vil siga 10 mió um árið frá 2036
- Viðlíkahald av tunlinum er nú sett til 26 mió kr. um árið (broytt frá 25 mió. kr)
- Miðalkostnaðurin av Smyril (rakstur og íløgur í tveir nýggjar) er nú 150 mió. kr. um árið (broytt frá 146 mió. kr.) Her skal vísast til, at FMR í skrivi til Løgmansskrivstovuna 13. desembur 2024 vísti á, at rætti miðal kostnaðurin fyri Smyril ikki var 146 mió. kr. í miðal, men 130 mió. kr.

Úrslitið í rokniarkinum vísir nú, at íløgan:
- sum fær 160 mió. kr um árið í rakstrarstuðli frá 2036 og 30 ár fram til 2065*,
- sum fær eitt innskot á 1,35 mia. kr. frá 2025 til 2034,
- gevur eitt negativ úrslit (hall) á fíggjarlógina á 13,7 mió. kr. um árið frá 2036 til 2065

Landsbanki Føroya · Kvíggjartún 1 · Box 229 · FO-165 Argir

* Í "Ískoyti til Fíggingarleistur Suðuroyartunnilin oktobur 2024" síða 3 stendur: *"Ætlanin er, at P/F Suðuroyartunnilin skal fáa rakstrarstuðul, sum svar til kostnaðin av siglingini um Suðuroyarfjørð við Smyril og til Skúvoy við Sildberanum."*

Tunnilin er tí í hesum roknistykki 1,8 mia. kr. (+ byggirentur) dýrari enn verandi farleið við Smyril, og tá eru tveir nýggir Smyrlar við í roknistykkinum. (1,35 mia í innskotskapitali pluss 13,6 mió. kr. um árið í 30 ár frá 2036 til 2065).

Kostnað-nyttu greining er rætta amboðið
Sum Landsbankin hevur víst á, so eigur samanberandi roknistykkið, millum verandi farleið og tunnilin, ikki at verða brúkt sum grundarlag undir eini støðutakan, um Suðuroyartunnilin skal borast ella ikki. Rætta amboðið í hesum føri er ein kostnað-nyttu greining.

Kostað-nyttu greiningin er dagført, og hon vísur í besta lagi eitt hall á 914 mió. kr, sambært fylgiskjali nr. 36 til lógaruppskotið. Tá úrslitið er negativt eigur íløgan ikki at verða framd, tí hon gevur eitt samfelagsbúskaparligt hall.

Landsbankin hevur lagt til merkis í kostnað-nyttu greiningini, at farleið 1A (úr Djúpadali) og farleið 2A (úr Múlanum) hevur ein mun á 320 mió. kr. (linjuføring 1A: -914, linjuføring 2A :-1.234)

Landsverk hevur í kostnað-nyttu greiningini fyrivarni fyri kostað-nyttu greiningini, at tey ikki hava fyrihildið seg til áløgdu kostnaðarmetingarnar. Landsverk stendur tí einans inni fyri háttalagnum av greiningini.

Tó undrast Landsverk á, eins og óhefti ráðgevin Kaspar Nordmelan, at tunnilin til Sandarlíð er ein avleidd verkætlan fyri linjuføring 2 (frá Múlanum til Sandvík). Henda verkætlan er ikki ein partur av linjuføring 2, og eigur tí ikki at vera ein fyritreyt fyri verkætlanina. Landsbankin er samdur við Kaspar Nordmelan og Landsverk. Tað er sera misvísandi at taka hesa verkætlan við í linjuføring 2, tá kostnað-nyttu greining verður gjørd av linjuføring 2.

Landsverk hevur í kostnað-nyttu greiningini eisini gjørt eina viðkvæmisgreining av hesum báðum farleiðum, tað vil siga, hvat skal til fyri at farleið 2A verður líka góð sum farleið 1A.
Her er úrslitið, at um kostnaðurin á farleið 2A (úr Múlanum) lækkar við 317 mió. kr., so verða farleiðirnar líka góðar.

Her er vert at leggja til merkis, at við í kostnaðinum í farleið 2A (úr Múlanum) er vegur til eysturbygdirnar, sum er mettur at kosta 230 mió. kr. Um vegurin til eysturbygdirnar verður tikin burturúr kostnað-nyttu greininigini, sum er tað rætta at gera, so eru nútíðarvirðið av farleið 1A og 2A nærum tað sama.

Landsbankin leggur eisini hjá viðmerkingarnar, sum bankin hevði til lógaruppskotið, sum var til hoyringar í desembur 2024 og eisini fyrivarnið Landsbankin hevur til "Fíggingarleistur Løgmansskrivstovan, oktober 2024".

Landsbanki Føroya · Kvíggjartún 1 · Box 229 · FO-165 Argir

LM-066/2025

Landsbanki Føroya

FAROE ISLANDS GOVERNMENTAL BANK

Argir 12. desembur 2024

Landsbankin hevur fingið uppskot um Suðuroyartunnil við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum til ummælis.

Landsbankin vísir til sína grein við heitinum "Er ráðiligt at byggja suðuroyartunnil nú?", sum var lagt út á heimasíðu Landsbankans 11. novembur 2024. Greinin er endurgivin niðanfyri.

Landsbankin hevur harafturat fylgjandi viðmerkingar:

Vælferðin í vanda:

Búskaparráðið gav í januar 2024 út frágreiðing um fíggjarpolitiskt haldføri. Greiningin sum ráðið hevur gjørt vísir, at útreiðslurnar veksa frá inntøkunum komandi árini, orsakað av demografisku broytingunum. Tað elvir til undirskot á fíggjarlógini og hækkandi skuld.

Hvat merkir tað, at fíggjarpolitikkurin ikki er haldførur? Tað merkir at vælferðarsamfelagið sum vit kenna tað í dag, er í vanda, um ikki neyðug tiltøk vera gjørd fyri at fáa inntøkur og útreiðslur at ganga upp.

- Í einum vælferðarsamfelag tryggjar landið, at allir borgarar hava rætt til nøkur grundleggjandi sosial rættindi. Til dømis hava allir føroyingar atgongd til sjúkraviðgerð, uttan mun til hvat tey tjena. Øll hava rætt til fría skúlagongd, eisini ansing av børnum er partur av vælferðarsamfelagnum og eldrarøkt verður veitt, uttan mun til hvat tú tjenar.
- Vælrerðarsamfelagið er í vanda og Føroya land fer ikki í framtíðini at kunna bjóða borgarunum somu vælferð sum í dag, tá fíggjarpolitikkurin ikki er haldførur. Stórur vandi verður fyri, at tænasturnar vit fáa frá sjúkrahúsverkinum, frá skúlunum, frá eldrarøktini, og øðrum almennum tænastum verða munandi verri.
- Fyri framhaldandi at veita borgarunum í Føroyum hesi somu rættindi í framtíðini, er neyðugt at politisku myndugleikarnir fáa haldføri í fíggjarpolitikkin.
- Uppskot hevur verið til hoyringar um at økja pensjónsaldurin frá 68 til 70 ár. Hetta hjálpir væl, men loysir bara um helvtina av trupulleikanum. Enn eru eingi tiltøk gjørd, sum munandi bøta um rásarúmið fram ímóti 2035, og tað vil siga, at tað almenna fær veksandi hall komandi árini.
- Ikki fyrr enn neyðug tiltøk eru framd at fáa fíggjarpolitikkin haldføran, kann ein íløga í ein suðuroyartunnil raðfestast. Íløgan í suðuroyartunnil svarar til 20% av BTÚ og fer at leggja stein omaná byrðu í arbeiðinum at fáa útreiðslurnar til at svara til inntøkurnar.
- Landsbankin metir tí, at tað ikki er ráðiligt at fara undur at bora ein suðuroyartunnil, sum fíggjarligu útlitini eru í løtuni.
- At bora ein suðuroyatunnil bindur landskassan til eina stóra fasta útreiðslu næstu 30-40 ár, sum ikki slepst burturúr, og ger at hallið hjá landskassanum verður enn verri næstu 10-15 árini.

Grein á heimasíðu Landsbankans, frá 11. november 2024:

Er ráðiligt at byggja suðuroyartunnil nú?

Strukurpolitikkur er langsigtaður politikkur, tað vil siga, at vit eiga at hyggja at hesi verkætlan og fremja hana um og tá tað er ráðiligt. Tað er ikki ráðiligt at fara undir hesa verkætlan nú, tá vit vita, at fíggjarpolitikkurin ikki er haldførur og ikki tekur atlit at teimum stóru avbjóðingunum sum almenni geirin hevur fyri framman. Neyðugt er, at politisku myndugleikarnir fyrst fáa fíggjarpolitikkin haldføran. Ikki fyrr enn tá, eigur man at hyggja at hesi verkætlan at byggja ein undirsjóvartunnil til Suðuroyar. Harafturat eiga fyrireikingarnar til hesa risa íløguna at vera nógv betri. Landsbankin hevur ringt við at skilja at henda verkætlan hevur sovorðnan skund. Talan er um eina infrakervisíløgu, sum skal halda 50-70 ár fram í tíð, og tá er ikki so umráðandi um hon verður framd 1 til 2 ár fyrr ella seinni.

Inngangur

At bora ein suðuroyartunnil er størsta verkætlan Føroyar yvirhøvir fara undir. Hon er eisini risa stór samanborið við verkætlanir í øðrum londum.

Leiðslan í partafelagnum Eystur- og Sandoyartunlinum metir, at samlaða íløgan í ein suðuroyartunnil er 4 mia. kr.[1] Tá byggirentur vera taldar við, er kostnaðurin av verkætlanini út við 5 mia. kr.[2] Hetta er í 2024 prísum. Tað svarar til knapt 18% av mettum BTÚ fyri 2024.[3]

Ein so stór verkætlan eigur at verða fyrireikað sera væl. Fyrireikingararbeiðið og forarbeiðið av verkætlanini er við til at minka um váðan við verkætlanini, soleiðis at landsstýrið, tá tað tekur avgerð um at bora ella ikki, hevur so góða vitan sum møguligt.

Tunnilin er ein týðandi langtíðar infrakervisíløga, og loysnin skal halda næstu 50-70 árini. Tí eiga landsins myndugleikar at tryggja sær, at rætta loysnin verður vald og at tað er ráðiligt at gera íløguna. Tað er av minni týdningin, um íløgan verður framd 1-2 ár fyrr ella seinni.

Fyrireikingin av verkætlanini

Sum skrivað omanfyri, er suðuroyartunnilin ein langtíðaríløga og ein risa stór verkætlan. Tí má kravið vera, at verkætlanin er fyrireikað so væl, sum til ber.

Í hesum sambandi er upplagt at hyggja at, hvussu londini kring okkum gera, tá tey hava ætlanir um stórar verkætlanir, og kanska serliga til Noreg, tí tey eisini bora fleiri undirsjóvartunlar.

Í Noreg brúka tey ”anslagsmetoden” tá tey fyrireika stórar verkætlanir.

Størsti spurningurin í eini verkætlan sum hesari, er kostnaðurin av verkætlanini ella prísurin. Prísmetingin er rættiliga nógv treytað av, hvørjar fortreytir um kostnaðin tú nýtir. Hátturin í "anslagsmetoden" er, at tey seta ein bólk av serfrøðingum við viðkomandi vitan og royndum. Bólkurin telur millum 5 til 10 persónar. Hesar spyr man so óheft av hvørjum øðrum, hvat prísurin er á ymiskum høvuðspostum í verkætlanini. Tað kann vera asfaltering, burturbeining av gróti, spreinging og so framvegis. Serfrøðingarnir skulu geva ein:

- Minsta prís
- Væntaðan prís
- Mesta prís

Útfrá hesum fæst ein breitt grundfestur prísur á verkætlanini, sum byggir á fleiri óheftar metingar. Í prísmetingin av suðuroyartunlinum er bert *ein* spurdur um prís, og tí er prísurin sum P/F Suðuroyartunnil metir, ikki eins tryggur, samanborið við um tú hevði fylgt "anslagsmetoden". Eisini vísir notatið hjá Landsverk á, at hátturin sum P/F Suðuroyartunnil hevur gjørt prísmetingina eftir, gevur eina ov positiva mynd av váðanum í prísmetingini.[4]

Eitt annað, sum er umráðandi, tá verkætlanirnar eru so stórar er, at fyrireikingararbeiðið verður góðskutryggjað av uttanhýsis ráðgeva. Tað ger man tvær ferðir. Eina ferð eftir "konseptfasuna" og eina ferð afturat eftir at forprojektið er gjørt. Enn er eingin góðskutrygging farin fram av suðuroyartunnilsverkætlanini.

At góðskutryggja og fylgja mannagongdum fyri tílíkum verkætlanum, sum eisini okkara grannalond gera, fer at taka longri tíð, men sum skrivað í innganginum, so er tað av minni týdningin um íløgan verður fram 1-2 ár fyrr ella seinni. Tað sum er umráðandi er, at fyrireikingarnar eru so góðar sum møguligt til hesa risa íløgu, so tryggjað verður, at avgerðin um at bora ella ikki, er rætt.

Landsbankin heldur eisini tað er løgið, at fyrireikingarnar til hesa stóru verkætlan ikki liggja hjá myndugleikanum á økinum. Vanliga mannagongdin í grannalondum okkara hevði verið, at almenni myndugleikin fyrireikaði hesa stóru verkætlan sambært forskriftum fyri tílíkum stórum verkætlanum. Ikki fyrr enn hetta arbeiðið var liðugt, átti tað verið handað til partafelagið, sum skal standa fyri at bora tunnilin og annars at útinna arbeiðið.

Men í hesum føri vendir tað øvugt. Fyrireikingarnar liggja hjá partafelagnum. Til dømis er tað partafelagið Suðuroyartunnil, sum hevur avgjørt, hvar linjuføringin skal vera. Er tað rætt? Og er tað rætt at tað er P/F Suðuroyartunnil, sum avgerð, hvat trygdarstigið skal vera í tunlinum? At fyrireikingarnar liggja í P/F Suðuroyartunlinum kann eisini merkja, at arbeiðið ikki hevur tað gjøgnumskygnið, sum ein so stór verkætlan eigur at hava. Felagið er ikki fevnt av almennum innliti.

Landsbankin vil eisini vísa á, tað sum Landsverk skrivar í teirra temablaði "Kostnaðarmeting" frá 2023, at tað eru serliga tvey viðurskifti, sum gera seg galdandi í verkætlanum, sum hesari. Tað eru "optimism bias" og "strategic misrepresentation". "Optimism bias" kann umsetast sum bjartskygdur skeivleiki og meinast tað við, at vit í fyrireikingini av verkætlanum eru ov bjartskygd og ikki leggja upp fyri teimum óvissum, sum kunnu vera í einari verkætlan. "Strategic misrepresentation" ella strategisk avskeplan er, tá ið ein í avgerðartilgongdini tilvitað yvirmetir ágóðan og undirmetir kostnaðin av verkætlanini fyri at fáa hana setta í verk.

Landsbankin heldur, at myndugleikarnir hava gjørt ov lítið fyri at tryggja, at hesir váðar vera avmarkaðir mest møguligt.

Kost-nyttu greiningar er besta amboðið at brúka sum avgerðargrundarlag fyri, hvørjar infrakervisíløgur skulu fremjast

Landsverk hevur í frágreiðing frá 2021 gjørt eina kost-nyttu greining av nýggjari suðuroyarleið. Her vera fimm ymiskir møguleikar kannaðir og samanbornir við verandi farleið, sí mynd 1 niðanfyri. Ein ferjuleið frá Sandi til Hvalbiar kundi eisini verið lagdur afturat greiningini.


Av teimum fimm møguleikunum, sum Landsverk hevur greinað, er bara ein møguleiki, sum gevur eitt positivt úrslit, og er tað ein nýggj siglingarfarleið millum Sand og Tvøroyri, sí talvu 1. Tá úrslitið av kanningini er negativt merkir tað, at tað er eitt tap fyri samfelagið, og tí eigur íløgan ikki at vera framd.

Eitt annað sum er vert at leggja til merkis, er, at ein tunnil beinleiðis frá Sands bygd til Suðuroyar gevur betri úrslit, enn ein tunnil av Skarvanesi til Suðuroyar.

Landsverk hevur í summar dagført kost-nyttu greiningina, men bara fyri tunnilin frá Skarvanesi til Suðuroyar. Landsbankin heldur tað vera løgið, at Landsverk bert er biðin um at dagføra kost-nyttu greiningina uppá triðbesta møguleika (tunnil frá Skarvanesi). Tað vil siga, at hugt verður als ikki eftir besta og ei heldur eftir næstbesta møguleika.

Landsbankin mælir til, at eisini hinir møguleikarnar, sum eru í frágreiðingini frá 2021, verða dagførdir.

Mynd 1 og talva 1



Møguleiki	1 Beinleiðis Skarvanes	2 Beinleiðis Sandur	3 Óbeinleiðis Skúgvoy	4 Toktunnil	5 Núggj ferjuleið
Byggikostnaður:	**-4.517**	**-4.734**	**-4.906**	**-5.962**	**-809**
Verklagskostnaður	-5.638	-5.909	-6.124	-7.442	-1.023
Restvirði	1.121	1.175	1.218	1.480	214
Rakstur og viðlikahald:	**-1.101**	**-1.051**	**-1.094**	**-1.573**	**-1.625**
Rakstur, vegakervi	-1.101	-1.051	-1.094	-	-1.625
Rakstur, jarnbreyt	-	-	-	-1.573	-
Brúkaraágóði:	**736**	**957**	**933**	**422**	**105**
Spard ferðatíð, fólk	1.740	1.897	1.895	922	478
Spard ferðatíð, farmur	22	24	24	10	6
Koyrikostnaður	-1.025	-964	-986	-510	-379
Uttanvirknaður:	**86**	**91**	**88**	**155**	**26**
Ferðsluóhapp	-54	-52	-53	-27	-19
Larmur	-70	-67	-68	-35	-24
Luftdálking	159	159	159	162	53
Umhvørvið (CO_2)	50	50	50	55	17
Aðrar avleiðingar:	**-82**	**-101**	**-109**	**-447**	**55**
Avgjaldsavleiðing	203	194	198	99	71
Skattaavlaging	-335	-358	-368	-573	-26
Økt arbeiðsmegi	51	62	61	27	10
Eyka avleiðingar:	**3.200**	**3.200**	**3.351**	**3.200**	**2.319**
Sparingar av verandi farleið	2.892	2.892	3.044	2.892	2.319
Avtýsingar av ferjum	15	15	15	15	
Betran innan elektroniska infrakervi, orka	251	251	251	251	-
Betran innan elektroniska infrakervi, internet	41	41	41	41	-
NNV	**-1.678**	**-1.638**	**-1.735**	**-4.205**	**72**
IRR	2,1%	2,2%	2,2%	1,0%	3,5%
Netto nytta pr. almenna krónu*	-	-	-	-	1,65

*Bara týdning, um verkætlanin hevur eitt positivt NNV

Kelda: Landsverk: Forkanning av einari nýggjari suðuroyarleið, 2021.

Arbeiðsbólkurin at viðgera fíggingarleist

Landsbankin hevur verið við í arbeiðsbólkinum at viðgera fíggingarleist fyri verkætlanina, og hvørja ávirkan ein suðuroyartunnil vil hava á fíggjarlógina. Til tað arbeiðið hevði Løgmansskrivstovan biðið Numo um at gera ein útrokningarmyndil, soleiðis at verkætlanin at bora ein suðuroyartunnil kann samanberast við verandi farleið (Smyril) – samanberingin koyrir bert uppá, hvussu báðir møguleikarnir ávirka fíggjarlógina.

Landsbankin vil vísa á, at hesin leistur og hetta arbeiðið einans kann brúkast til at fáa vitan um, hvussu nógv av tunnilskostnaðinum verður rindaður av ferðsluni, og hvussu nógv skal rindast av landskassanum. Hetta kann als ikki nýtast sum grundarlag fyri, um íløgan skal gerast ella ikki.

Tað er tó ávísur vandi fyri, at tað júst er tað, ið politikararnir nýta hendan útrokningarmyndil til.

Dømi 1 í hesi frágreiðing vísir eitt positivt úrslit á fíggjarlógini á 40 mió. kr. Men fyri at fáa hetta positiva úrslit, má landskassin seta 1,35 mia. í verkætlanina. 350 mió. kr. frá íleggingargrunninum og síðani 100 mió. kr. um árið í 10 ár. 100 mió. kr. í 10 ár er 1 mia. kr., og hon skal fíggjast. Men henda milliard er ikki tald við í lánikostnaðinum. Harafturat er tað eisini skeivt at samanbera Smyril farleiðina, sum einki innskot fær, við ein suðuroyartunnil, sum fær 1,4 mia. kr. í innskotið. So har eru fleiri ivamál við hesum roknistykki.

Roknistykkið vísir eisini, at suðuroyarsiglingin kostar sera nógv, tí ferðaseðlaprísurin varð settur niður í helvt í umleið 2007 og síðani ikki er javnaður við kostnaðar- ella lønarstøði.

Politiskar avgerðir hava sostatt gjørt, at suðuroyarsiglingin er so mikið kostnaðarmikil á fíggjarlógini sum hon er. Hetta ger, at suðuroyarsiglingin sær eyka dýr út.

Eitt annað, sum hetta roknistykki heldur ikki tekur við, er spurningurin um hvørt innskotið á 1,4 mia. kr. kundu verið brúktar betri aðrastaðni. 1,4 mia. kr. eru nógvir pengar og politikararnir eiga at brúka teir har, sum teir gera størst nyttu fyri føroyska samfelagið. Tað er als ikki vist at teir gera best nyttu í P/F Suðuroyartunnil.

Grundarlagið fyri um íløgan eigur at vera framd ella ikki eigur at verða tikin út frá kost-nyttu greiningini av teimum møguleikum sum eru, sí brotið omanfyri.


Er tað ráðiligt at fara undir eina so stóra verkætlan í verandi støðu?


Føroyski búskapurin er væl fyri í løtuni. Skuldin er lutfalsliga lág bæði hjá landi og kommunum, fyritøkur og húsarhald eru væl fyri, yvirskot er á handilsjavnanum og Føroyar hevur einki arbeiðsloysi. Tí metir Landsbankin ikki, at tað verður nakar trupulleiki at taka lán fyri at fíggja hesa verkætlan. Trupulleikin er ikki sjálv lántøkan, men heldur at lánið skal rindast aftur. Og hóast allar bestu tíðir nógv ár á rað, hava bæði land og kommunur hall á teirra roknskapum. Harvið er einki uppspart til, til dømis at brúka uppá hesa verkætlan.

Harafturat hava Føroyar eina sera stóra haldførisavbjóðing fyri framman. Frágreiðing frá Búskaparráðnum um fíggjarpolitiska haldførið frá januar 2024 vísti, at fíggjarpolitikkurin ikki er haldførur og at nógv tiltøk mugu gerast, fyri at fáa javnvág millum inntøkur og úteiðslur hjá almenna geiranum.

Stóra orsøkin til hetta, eru demografisku broytingarnar. Vit gerast fleiri eldri, samstundis sum talið av teimum í arbeiðsførum aldri so at siga stendur í stað, sí mynd 2.

Mynd 2





Um einki verður gjørt við hesa risa avbjóðing, fáa føroyingar eina støðugt og skjótt vaksandi skuld fram til 2060.

Gera vit tiltøk, eitt nú at hækka pensjónsaldurin og fremja rationaliseringar á almenna økinum, betra vit um fíggjarpolitiska haldførið, men tað krevur at politisku myndugleikarnir veruliga raðfesta at loysa hendan trupulleikan.

Um hugt verður uppá millumlangt sikt, so sær út til, at hallið á fíggjarlógini bara veksur komandi árini. Væntast kann, at hallið er vaksið upp til 1 mia. kr. í 2035, tvs. bara næstu 10 árini er ein fíggingartørvur á 6 mia. kr. Um tunnilin verður gjørdur, so ger henda eykaútreiðsla, at tað verður enn torførari at fáa javnvág á fíggjarlógina.

Neyðugt er at loysa hesa avbjóðing við fíggjarpolitiska haldførinum fyrst. Neyðugt er at fremja stórar nýskipanir innan almenna geiran. Til dømis mugu stórar íløgur gerast í eldraøkið bæði fyri at rationalisera raksturin, men eisini tí tørvurin verður størri, og meir peningur má setast av til heilsuøkið. Tað ber ikki til at siga, at eldraøkið hoyrir til kommunurnar, tí óansæð hvat, so eru vit bara eitt ávíst tal av skattgjaldarum, sum skulu fíggja bæði land og kommunur. Hetta er ein landspolitisk uppgáva.

Politisku myndugleikarnir kunnu ikki bara hyggja einsamalt eftir stóru verkætlanini at bora ein tunnil til Suðuroyar. Politisku myndugleikarnir mugu hyggja eftir samlaða føroyska búskapinum, og ásanna, at suðuroyartunnilin bert er ein av mongum verkætlanum. Neyðugt er at raðfesta, tí Føroyar hevur ikki ráð til allar.

Fíggjarmálaráðið hevur í síni búskaparfrágreiðing frá mars 2023 gjørt eitt yvirlit yvir íløgutørvin næstu 15 árini.[5] Tey vísa á ein íløgutørv á 26 mia. kr. býttar millum land, kommunur og almenn feløg. Íløgurnar hjá kommunum eru bara leysliga mettar, og tað er ikki lagt upp fyri øðrum stórum verkætlanum, sum óvæntað kunnu koma uppá tal. Tað skal sigast, at í hesum 26 mia. kr. er suðuroyartunnilin íroknaður. Ein fyrsta raðfesting kundi verið at býta íløgurnar upp í, hvat er neyðugt at gera av íløgum og hvat kann bíða. Eitt er vist, at alneyðug er, at gera íløgur í eldraøkið og bústovnar annars, tí verandi bygnaður við smáum eindum er alt ov dýrur.

Taka landsmyndugleikarnir ikki haldførisavbjóðingina í álvara, er vandi fyri, at skattatrýstið verður so høgt, at ung fólk, sum fara av landinum at lesa, ikki ynskja at venda heim aftur, og eisini at fólk sum búgva í Føroyum flyta.

Tunnilskostnaðurin fer at troðka skilagóðar íløgur burtur í almenna geiranum

Landsstýrið tykist ikki at ásanna, at tað er tann fulli íløgukostnaðurin á 4 mia. kr. (umframt váðaískoytið), sum skal haldast upp ímóti øðrum almennum íløgum, tá metast skal um skynsemi í at gera íløguna. Ført verður fram, at íløgan "einans" tyngir fíggjarlógina við 100 mió. kr. árliga næstu 10 árini umframt aðrar 350 mió. kr. (frá Íleggingargrunninum). Og harafturat at

íløgan ikki tyngir fíggjarlógina, tá tunnilin er liðugur, men tvørturímóti at landið sparir rakstrarútreiðslur til ferju. Landsbankin skal vísa á, at allir pengarnir koma úr sama kassa, og hóast landskassin setir 1,35 mia. kr. í P/F Suðuroyartunnil, so minkar hetta ikki um fíggjarligu byrðuna hjá landskassanum. Hetta er sigarkassahugsan, sum kann fáa politisku skipanina at taka hesa stóru íløguavgerð grundað á eitt misvísandi búskaparfakligt grundarlag.

Landsbankin skal vísa á, at ein so stór lánsfíggjað íløga í ein undirsjóvartunnil leggur nøkur bond á politiska skipanina í fleiri áratíggjur fram. Henda íløgan fer at troðka fleiri aðrar skilagóðar íløgur, sum eru alneyðugar, burtur.

Niðurstøða

Strukurpolitikkur er langsigtaður politikkur, tað vil siga, at vit eiga at hyggja at hesi verkætlan og fremja hana um og tá tað er ráðiligt.

Tað er ikki ráðiligt at fara undir hesa verkætlan nú, tá vit vita, at fíggjarpolitikkurin ikki er haldførur og ikki tekur atlit at teimum stóru avbjóðingunum sum almenni geirin hevur fyri framman.

Neyðugt er, at politisku myndugleikarnir fyrst fáa fíggjarpolitikkin haldføran. Ikki fyrr enn tá, eigur man at hyggja at hesi verkætlan at byggja ein undirsjóvartunnil til Suðuroyar.

Harafturat eiga fyrireikingarnar til hesa risa íløguna at vera nógv betri. Landsbankin hevur ringt við at skilja at henda verkætlan hevur sovorðnan skund. Talan er um eina infrakervisíløgu, sum skal halda 50-70 ár fram í tíð, og tá er ikki so umráðandi um hon verður framd 1 til 2 ár fyrr ella seinni.

---

[1] Kostanðurin er íroknað Sandvíkartunnil við vegføring, umkoyringarvegur í Hvalba og trygdarrúm. Landsverk metir, at kostnaðurin verður væl meira enn tað.

[2] Landsbankin skal vísa á, at Eysturoyartunnilin var í 2012 mettur at kosta 1,13 mia. kr. og framroknað til 2016 prísir var tað 1,27 mia. kr. Verklagskostnaðurin í 2016 gjørdist 1,54 mia. kr. Somu tøl fyri Sandoyartunnilin eru ávikavist 1 mia. í 2018, framroknað til 1,1 mia. kr. í 2021 og verklagskostnaðurin í 2021 gjørdist 1,3 mia. kr. Tað vil siga fyri Eysturoyartunnilin var kostnaðurin 22% hægri, enn upprunaliga mett, og fyri Sandoyartunnilin 19% hægri enn mett. Kelda: Landsverk, Temablað; ”Kostnaðarmeting” 2023.

[3] ES-tunlarnir kostaðu 2,7 mia. kr. og byggingin byrjaði í 2017, tá BTÚ var 19,7 mia. kr. Tað vil siga, at verkætlanin var 13,7% av BTÚ. Somuleiðis ein risa stór verkætlan. Munurin millum ES-tunlarnar og suðuroyartunnilin er tó, at bara millum 10-20% av fíggingini verður goldin av ferðsluni í suðuroyartunlinum, og restin verður goldin av skattaborgarunum (landskassanum). Av ES-tunlunum fíggjar ferðslan um 80% meðan um 20% verður goldið av skattaborgarunum.

[4] Sí notat frá Landsverk, har tey gera sínar viðmerkingar til kostnaðarmetingina av suðuroyartunlinum hjá P/F Suðuroyartunnil. Notatið er skrivað í sambandi við arbeiðnum hjá arbeiðsbólkinum at finna ein fíggingarleist.

LM-066/2025

Landsbanki Føroya

FAROE ISLANDS GOVERNMENTAL BANK

Argir oktober 2024

Fyrivarni Landsbankans til samanbering av kostnaði av suðuroyarsigling og suðuroyartunli

Føroya Landsstýri hevur sett ein arbeiðsbólk, sum hevur fingið til uppgávu at samanbera kostnaðin av verandi suðuroyarsigling við kostnaðin av einum undirsjóvartunli til Suðuroyar.

Landsbankin hevur luttikið í arbeiðinum og útvegað tøl og greitt frá um væntaða rentukostnaðin.

Leisturin

Fíggingarleisturin, sum er mentur í sambandi við hetta arbeiðið er eitt rokniark, sum samanber kostnaðin av farleiðini við Smyril og kostnaðin av einum undirsjóvartunli til Suðuroyar.

Hesin leistur kann tó bara brúkast til at fáa vitan um, hvussu nógv av tunnilskostnaðinum verður rindaður av ferðsluni og hvussu nógv skal rindast av landskassanum.[1]

Hetta kann als ikki nýtast sum grundarlag fyri, um íløgan skal gerast ella ikki. Tað er tó ávísur vandi fyri, at tað júst er tað, ið politikararnir gera.

Kost-nyttu greiningar er rætti hátturin at meta um infrakervisíløgur

Kost-nyttu greiningar taka bæði atlit til kostnað og samfelagsnyttu av infrakervisætlanum og eigur tí altíð at verða nýtt sum høvuðsgrundarlag undir avgerðum um infrakervisíløgum.

Landsverk hevur gjørt eina kost-nyttu greining um farleið til Suðuroyar í 2021. Umframt verandi farleið við Smyrli, hevur Landsverk í hesi greining kannað fimm aðrar farleiðir.

Hetta er rætti greiningarhátturin at meta um, hvørt ein íløga í infrakervi eigur at vera framd ella ikki.

Landsverk hevur júst dagført metingina. Dagføringin er gjørd fyri tunnil frá Skarvanesi til Suðuroyar, og fyri tunnil frá Skarvanesi til Suðuroyar, har eisini farið verður upp í Skúvoy. Hesar verkætlanirar eru settar upp móti verandi farleið við Smyrli.

Úrslitið vísir eitt negativt nútíðarvirði á góða hálva milliard krónur; ávikavist 557 mió. kr. og 554 mió. kr. Tí eiga hesir møguleikar ikki at fremjast, tí teir geva eitt samfelagsbúskaparligt tap.

[1] Lutfallið er í stórum tølum, at landskassin fíggjar 80% meðan ferðslan fíggjar 20%. Hesin tunnil kann tí ikki samanberast við ES-tunlarnar, tí har er lutfallið umvent; at ferðslan fíggjar 80% meðan landskassin fíggjar 20%.

Kost-nyttu greiningin er bert dagførd fyri leiðina frá Skarvanesi til Suðuroyar (+ har Skúvoy er við). Men Landsbankin heldur, at dagføringin eisini átti at verið gjørd fyri fleiri loysnum, eins og tey hava gjørt í teirra frágreiðing frá 2021. Tað vil siga ein kost-nyttu greining av 1) ferjusambandinum yvir Sand, sum gevur besta samfelagsavkastið sambært greiningini hjá Landsverk frá 2021 og 2) beinleiðis suðuroyartunlinum frá Sandi til Sandvíkar, sum gevur næstbesta avkastið. Eisini hevði grundarlagið fyri eini avgerð verið enn betri, um ein kost-nyttu greining verður gjørd av einum ferjusambandi millum Sand og Hvalba, heldur enn Tvøroyar.

Landsbankin heldur tað vera skeivt at greina triðbesta møguleikan í greiningini hjá Landsverk frá 2021, men ikki besta og næstabesta møguleikan.

Rætta samanberingin er millum undirsjóvartunnil og ferjusamband millum Sand og Suðuroy

Landsbankin heldur ikki at samanberingin av kostnaðinum av undirsjóvartunli og verandi suðuroyarsigling er viðkomandi fyri støðutakan til ein møguligan suðuroyartunnil.

Nú, ið koyrandi er frá Havnini til Sands, er tann viðkomandi samanberingin kostnaðurin av ferjusambandi millum Sand og Suðuroynna øðrumegin og tunnilssambandið hinumegin.

Suðuroyarsiglingin, sum er eitt dýrt samband, er ikki viðkomandi fyri samanberingina, tí sambandið yvir Sandoy er bíligari.

Samanbering av kostnaði á fíggjarlógini er ikki ein góður og tryggur háttur at meta um infrakervisíløgur

Landsbankin heldur ikki, at samanberingin millum, hvussu nógv núverandi suðuroyarsiglingin øðrumegin og ein suðuroyartunnil hinumegin kosta fyri landskassan á fíggjarlógini, er ein góður háttur at meta um, hvørjar infrakervisíløgur eiga at vera gjørdar.

Suðuroyarsiglingin kostar sera nógv fyri landskassan, men tað kemur av, at ferðaseðlaprísurin varð munandi lækkaður í 2007 og síðan ikki er javnaður við kostnaðar- ella lønargongdini.

Trupulleikin við útrokningarháttinum er, at hann er ov tilvildarligur, tí úrslitið er ov nógv treytað av fakliga ógrundaðum politiskum avgerðum.

Samanberingarhátturin tekur bert atlit til kostnað, men tekur ikki atlit til, at ávísar íløgur hava ymsa samfelagsnyttu við styttri ferðatíð og minni bíðitíð.

Harafturat verður ikki tikið atlit til, at landskassans skuld veksur við upp til 5 mia. kr. (íløgan íroknað rentur), um íløgan í tunnil verður gjørd. Hetta fer at gera rásarúmið at gera *neyðugu* íløgurnar komandi tíðina nógv verri.

Atlit verður ikki tikið til fíggjarpolitiska haldførið og rásarúmið

Landsbankin heldur, at myndugleikar landsins, umframt kost-nyttu greiningina eisini eiga at taka atlit at, hvussu íløgan og lántøkan fara at ávirka haldførið og rásarúmið hjá landskassanum komandi árini.

Búskaparráðið hevur gjørt eina meting av fíggjarpolitiska haldførinum, sum greitt vísir, at haldførið er sera vánaligt. Um hugt verður eftir rásarúminum uppá millumlangt sikt, so vísir ein framrokning av verandi inntøkum og útreiðslum, at hallið hjá almenna geiranum støðugt veksur upp til 1 mia. kr. árliga í 2035. Fíggingartørvurin er tí umleið 6 mia. kr. fram til 2035[2], um eingi tiltøk verða framd. Tiltøk mugu sostatt gerast fyri stórar upphæddir longu sum er, fyri at fáa almenna búskapin at hanga saman.

Landsbankin heldur tað tí ikki vera ráðiligt at gera ein suðuroyartunnil sum er, serliga um avgerðin verður tikin, áðrenn neyðugu tiltøkini eru framd at fáa javnvág í almenna búskapin.

[2] Støðið verður tikið í úrslitinum í 2023 og roknað er frameftir til 2035.